

songina, kann rokna við onkrum góðum. Men hetta vita mannfólk ikki altíð, tí ongin hevur fortalt teimum tað, sigur Joan Ørting, sum nú kemur inn á evnið, sum næsta bók hennara snýr seg um: At mannfólk ynskja at gleða kvinnuna! Er hon glað, eru øll glað – eisini maðurin og børnini.

– Kvinnur hava til allar tíðir kommunikerað við menninar við at koma við ábendingum. Men mannfólk skilja ikki tað ósagda og kunnu sjálvandi heldur ikki lesa tankarnar hjá kvinnuni. Fyri alt í verðini vil hann gleða kvinnuna, men hon má fortelja honum, hvussu hon vil hava tað. Eisini, hvussu hann skal gera tað romantiskt, greiðir hon frá.

Í hesum sambandi nevnir hon eisini nátt- og undirklæðini, sum skulu vera rein og lekkur.

– Her er traditionelli silkiundirkjólin við blondum perfektur, bæði til at elskast og at sova í, tí ofta dámar kvinnum ikki at vera heilt naknar, greiðir hon frá.

## Privata vaksnarúmið

Hjúnarúm eru alt ov ofta eitt litleyst stað, sum onki sigur um eigararnar. Ella eitt kalt og ljóst rúm við sveittaroyki, linoliumsgólvi og hárfeittutum koddum. Kanska er rúmið enntá eisini klædnagoymsla við strúkibretti, baljum og skititoyskurv. Myndir av børnunum, leikur og annað fortelur, at hetta rúmið eiga øll, men ongin er góður við tað.

– Og har skulu fólk trívast, elskast og dyrka hvønn annan, sigur Joan Ørting, sum staðiliga slær fast, at hjúnakamarið ikki er ein klædnagoymsla, men eitt vaksnaparadís, har onnur skulu banka uppá, áðrenn tey koma inn.

– Tað er sjálvandi í lagi, at børnini krúpa inn til foreldrini um morgunin. Men annars skulu bæði børn og sjónvarp út. Bæði eru tann vissi deyðin fyri sexlívið, sigur Joan Ørting.

*Lagt til rættis: Rigmor Dam*